# FØÐINGAR

9. juni fingu Anna og Atli Rasmussen, Keypmannahavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3875 gr.

7. juli fingu Jensia og Petur H. Brodersen, Tórshavn, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4750 gr.

8. juli fingu Heidi og Tummas Petur Davidsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long.

9. juli fingu Ingunn Innerdahl Hansen og Petur Petersen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3710 gr.

9. juli fingu Esther Lindenskov og Hjalmar Hvítklett, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3650 gr.

10. juli fingu Tanja Huneck, Glyvrum, og Símun Pauli Jacobsen, Syðrugøtu, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3050 gr.

10. juli fingu Linda Kristensen og Johnhard Poulsen, Miðvági, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3600 gr.

10. juli fingu Gitta Henriksen og Jákup av Kák, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3800 gr.

10. juli fingu Sigga í Hoyvík og Rúni Janusson, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3600 gr.

11. juli fingu Laila og Jón Poulsen, Nyborg, eina dóttur. Hon var 49 cm long og 2800 gr.

# ANDLÁT

**6. juli**
Gudrid Jacobsen í Vági, 60 ár.
**7. juli**
Greta Kjerstad, Vestmanna, 84 ár.
**8. juli**
Arnbjørn R. Thomsen, úr Havn, 59 ár.
**9. juli**
Petur Martin Poulsen, vanliga nevndur Petur í Fugloy, 87 ár.

# *Eitt ljós á gøtu míni*



## Verndin

> ***Sálmur 46,2:***
> *Guð er okkum vernd og verja, ein hjálp í trongdum, ið aldri svíkur.*

Eins og Guð hevur skapað alt, so er tað eisini hann, ið uppiheldur øllum. Paulus sigur tað soleiðis: »Í honum vórðu allir lutir skapaðir… og allir lutir standa við honum«. (Kol. 1,16).

Men tað eru tey, sum hóast tey viðganga, at Guð einaferð setti alt í gongd, setti náttúrulógirnar inn í heimin, har alt mátti ganga eftir teimum, tey siga at Guð helt uppat at virka og leggur ikki longur í tað, hann skapaði. Menniskjan er so statt sín egni harri.

Um tað var so, so høvdu vit verið noydd til at uppfinna ein guð til at vera við í teim ymsu viðurskiftunum, hevur ein heimspekingur einaferð tikið til. Og tað er ivaleyst rætt, tí tey menniskju, sum liva so trygg, at tey ongantíð hava brúk fyri einum Guði, munnu vera fá.

Heldur man tað vera so, at stúran og ótti ræður okkara millum. Vit stúra fyri degnum í morgin, eru bangin, um vit fara at klára avbjóðingarnar, ið liggja til okkara og hvussu hini fara at bera seg at ímóti okkum, og hvat man framtíðin fara at bjóða.

Men Guð er, og hann letur okkum ikki einsamøll. »Um so havaldan sjóðar og brýtur, og bergið í ódnini skelvur. Harrin er við okkum, Guð er vár fasta borg«. (Sl. 46,4).

Luther yrkti, sum kunnugt sálmin »Vár Guð er føst og haldgóð borg« út frá hesum sálmi. Luther var ikki nakar ræddur maður, tvørturímóti vísti hann dirvi har flestøll høvdu óttast, men hann var ikki bangin fyri at viðganga, at hann kendi seg tryggan í áliti á, at Guð var við honum.

*kj.m.*

# KIRKJUR & SAMKOMUR

## 4. sunnudagur eftir Trinitatis

*Vesturkirkjan:* lestur kl. 11. Talvan gongur fyri Sjómansmissiónina
*Argja kirkja:* kl. 11 Nemuel Babba, biskuppur í Luthersku kirkjuni í Nigeria, og Bergur D. Joensen. Talvan gongur fyri Sjómansmissiónina
*Havnar kirkja:* Bjarni Bæk kl. 11
*Kaldbak:* Elsa Funding kl. 12
*Vestmanna:* M. Bæk kl. 11
*Hósvík:* M. R. Jacobsen kl. 11
*Hvalvík:* M. R. Jacobsen kl. 12
*Norðskála:* Emil Olsen, kl. 10.40 skriftarmál, kl. 11 messa
*Fuglafjørður:* Uni Næs kl. 11, altargongd
*Skála:* Jógvan Fríðriksson kl. 11
*Oyndarfjørður:* Jógvan Fríðriksson kl. 18. (Eingin gudstænasta á middegi)
*Christianskirkjan: N. P. Danielsen kl. 11*
Klaksvíkar sjúkrahús: Hans Eiler Hammer kl. 10
*Norðoya Røktarheim:* Hans Eiler Hammer kl. 14.30
*Fámjin:* Miriam Ellendersen kl. 12
*Vági:* Ólavur Rasmussen kl. 11
*Tvøroyri:* P. M. Rasmussen kl. 11
*Øravík:* P. M. Rasmussen kl. 12.15, altargongd
*Svínoy:* Meinhard Bjartalíð kl. 12

## Ebenezer

Sunnudagin kl. 18: Evangeliskt møti. Sunnukvøldið kl. 21: Útimøti.

## Filadelfia, Landavegur 22

Í dag kl. 06.00, kl. 17.00 landsbøn. Í morgin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 11.00 morgunmøti, kl. 18.00 møti, kl. 22.00 útimøti. Mánadagin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 20.00 bønarskúlin.

## Rhema á Hálsi

Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli.
Morgunbøn mánadag til fríggjadag kl. 06. Øll eru vælkomin.

## Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin í Hoyvíkar skúla: kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti við Jóna Johannesen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Frelsunarherurin, Tórshavn

Leygardagin kl. 11: Útimøti. Sunnudagin kl. 11: Møti. Sunnudagin kl. 18: Møti, majorarnir Turid og Knut Gamst leiða og tala.

## Meinigheitshúsið í Havn

Sunnudagin YM-møti kl. 18 v/ Tom Skaale og Maureen Djurhus frá Jordan. Innsavnan til ytrimissión.
Týsdagin bíbliutími kl. 20 v/ Hera Tróndheim. Evni: Sangur og tónleikur í Meinigheitini.

## Saron, Vestmanna

Í kvøld kl. 21 útimøti/ sangløta á Torginum.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti. Sunnukvøldið kl. 20 útimøti á Torginum.

## Meinigheitshúsið í Sandavági

Møti verður sunnukvøldið kl. 18 v/ John S. Myllhamar, trúb.

## Keldan í Skálafirði

Leygardagin kl. 21: Opið hús.
Sunnudagin kl. 11: Morgunmøti og breyðbróting við Paula Høj.

## Ørkin, Saltangará

Møti verður sunnudagin kl. 19 í Arbeiðsmannafelagshúsinum Hæddini í Saltangará.
Hósdagin kl. 20 bønarmøti.
Um viðrar verður útimøti í Hvalvík leygardagin kl. 19.
Morgunbøn er mánamorgun, mikumorgun & fríggjamorgun frá kl. 6–7.

## Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum

Møti verður sunnudagin kl. 19 við Hans Ulrik Munk. Øll eru vælkomin.

## Betel, Vágur

Sunnudagin: Breyðbróting kl. 11. Evangeliskur fundur kl. 18. Útifundur kl. 21.
Mánadagin: Bønarfundur kl. 20.
Ónsdagin: Uppbyggingarfundur kl. 20.

## Samkoman Sion, Vági

Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 373777.

## Tilhaldið í Tórsgøtu 21

Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
Frá 3. juli til 14. august verður Tilhaldið opið soleiðis:
mánadag-fríggjadag
frá kl. 14-18.
*Ein skúlamyndaframsýning verður í Tilhaldinum á ólavsøku. Myndirnar eru frá skúlum í Havn gjøgnum tíðirnar. Áhugi er at lána gamlar myndir av skúlabørnum, lærarum, útferðum o.ø. til framsýningina. Tilh. tlf. 316491*
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

## Felagið Tórshavn: Gongutúrur

Sunnudagin 16. juli verður gongutúrur Elduvíkslíð-Vatnsdalur-Oyndarfjørður.
Farið verður við bussi av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið góð og heit gonguklæði og matpakka við. Tilmelding á Kunningarstovuni.

## AA-fundir í Havn

Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundir verða í kvøld kl. 20-21 og kl. 22.30-23.30.

## Al-Anon fundir í Havn

Fundir eru hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 21.00 á Vaskarínum.

## AA-fundur í Eysturoy

Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla (gamla lærarabúðin).

## Eysturoyar Gongufelag/ kunningarstovan

Gongutúrur verður sunnudagin 16. juli. Gingið verður niðan á Eiðis-koll og síðan eystur undir Krúp.
Túrurin er miðal. Vit møtast við Hotel Eiði kl. 14. Tekning fer fram á Eysturoyar Kunningarstovu, tlf. 449449.

## Reyði Krossur Føroya

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 19.00 til 21.00. Tlf. 212380.

## Kvinnuhúsið

svarar alt samdøgrið á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

## Amnesty International Føroya deild

*Tinghúsvegur 18, 4. hædd*
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

## Føroyskir fiskimenn uttanlands

tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

## Bahá'í Miðstøðin í Gundadali

Fyrsta leygardag hvønn mánað: Altjóða nátturði
«Potluck» kl. 18.30.
Opið hvørt fríggjakvøld: Samkoma kl. 20.
***Bahá'í-samfelagið í Tórshavn***

## Felagið Føroyar-Kuba

P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 - Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

## Læknavaktir

**Tórshavn:**
*Læknavaktin* tlf. 310033.

**Eysturoy:**
*Leygardagin 15. juli:*
Petur Østergaard, tlf. 447010
*Sunnudagin 16. juli:*
Knud Jacobsen, tlf. 423006

**Norðoyggjar:**
*Leygardagin 15. og sunnudagin 16. juli:*
Jens Nylander Madsen, tlf. 455045

**Vágar:** tlf. 332413

**Suðuroy (norður):**
Tlf. 371560

**Suðuroy (suður):**
Tlf. 373030

### Tannlæknavakt, Tórshavn

Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.



## Føroya Astma/ Allergifelag

Postadressa MBF-húsið, Íslandsvegur 10c.
Felagið hevur Tlf./fax 311419.

## Føroya Felag Móti Krabbameini

Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

## Javni

Skrivstovan verður stongd vegna summarfrí frá 15. juni. Ringjast kann til Dianu í Puntabyrgi tlf. 216510 ella Onnu Elisabeth Victorsdóttir, aftaná arbeiðstíð tlf. 315960.

## Epileptikarafelag Føroya

Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

## MBF

MBF-skrivstovan fer í summarfrí tann 17. juli fram til mánadagin 21. august.

## Deyvafelag Føroya

Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr.
deaf_fo@post.olivant.fo

## Føroysk gudstænasta í Reykjavík

Sunnudagin 25. kl. 14 verður føroysk gudstænasta í Háteigiskirkju í Reykjavík, Martin Restorff Jacobsen, prestur í Hvalvík talar.

## Nærvarpið LUMI radio í Aalborg

Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10.00.

## Føroyska nærvarpið í Esbjerg

Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11.00 og verður endursend kl. 16.00.

## Evangeliska Røddin

Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

## Føroysk møti

Føroysk møti eru triðja leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin.

## Føroyska arbeiðið Í Eliaskirkjuni

Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 969995, ella Øssuri Kjølbro, tlf. 36773820.

## Føroysku gudstænasturnar

í Samuelskirkjuni, Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14.00.
(Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

## Kristnastova

Birmavej 36, København S, tlf. 32 55 18 09
fax. 32 58 61 49
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20.
Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis.
Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

## Malta, Hirtshals

*Sunnudag:*
Kl. 11: Breyðbróting.
Kl. 18: Evangeliskur fundur.
*Mikukvøld kl. 20:* Bønar- og uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.
*Samkoman Malta í Hirtshals*

## Føroyingafelagið í Esbjerg

*Danmarksgade 25,*
*6700 Esbjerg, tlf. 75132747*
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

## Føroyskt barnamøti

Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Heimamissiónin

Hevur tú tørv á hjálp til at koma í ein kristnan felagsskap, ella ynskir tú at hjálpa til í andaligum arbeiði á fólkakirkjunnar grund í Danmark, so kanst tú ringja til: Hera Elttør, Aulum, tlf. 97473786, Jan Johannesen, Køb. tlf. 32886918/26272112, Birgir Johannesen, Køb. tlf. 35854159 ella Torleif Johannesen, Nes, tlf. 449024.

## Føroyingarfelagið í Aalborg

*Lille Kongens Gade 10 B.*
*Tel. 98136330*
Húsið er opið soleiðis:
Fríggjadag: Fimmarin frá 17.00 til 19.00
Leygardag: Opið hús frá 22.00 til 03.00

## Føroyahúsið í Keypmannahavn

Vesterbrogade 17 A
1620 København V
Tlf. 33 23 15 87
Fax 33 23 15 18
Kunningartlf. 33 23 15 86, sum sigur frá øllum tiltøkum.
Heimasíða:
www.faroehouse.dk
E-mail:
postur@faroehouse.dk
Upplatingartíðir:
mánadag–fríggjadag:
kl. 16.00–19.00.
*4.-22. juli*
Kaffistovan er stongd í 3 vikur.

## Føroyingafelagið í Århus

***Vestergade 48 D***
***8000 Århus C***
***Telefon og fax: 86180604***
***Teldupostur:***
***aarstova@teliamail.dk***
***Heimasíðan:***
***http://welcome.to/aarstova***
**Áarstova er opin soleiðis:**
Café Mánad.-hósd.: kl. 16-18
Føroysku bløðini liggja frammi.
Fríggjakvøldsbarr: kl. 21-03
Limir ókeypis atgongd. Onnur kr. 10,-.
**Onnur reglulig tiltøk í Áarstovu:**
**MFS.** Meginfelag Føroyska Studenta hevur opið hvønn mikudag kl. 16-18.
**Føroyskur barnaskúli** annanhvønn leygardag kl. 11-14 (ólíka vikur).
**Sunnudagsskúli** annanhvønn sunnudag kl. 14.30 (líka vikur).
**Bókasavn.** Føroyskar bøkur kunnu lánast mánadag-hósdag kl. 16-18.
**Ítróttartiltøk:**
**Flogbóltur.** Frydenlundskúlin fríggjadag kl. 16-18. Bussur nr. 4.
**Svimjing.** Frydenlundskúlin fríggjakvøld kl. 18-19. Bussur nr. 4.
**Fótbóltur.** Hasselager Hallen fríggjakvøld kl. 21-23. Bussur nr. 15.

## Føroyingar í Noregi

**E-mail:**
**foroyar@norden.no**
**Heimasíða:**
**http://www.norden.no/foroyar**
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

## Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen

Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Sørin Danielsen, tlf. 56147684 ella Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

## Føroyingafelagið í Reykjavík

Øldusløð 27
220 Hafnafjørður, Ísland
Tlf. 565 4883
E-mail: forrek@visir.is

## Prógv

**Gert Ørvarodd, Tórshavn, hevur 12. mai lokið yrkisútbúgving sum bakari. Lærupláss: Bakarin í SMS.**

**Elsa Maria í Beiti, Tórshavn, hevur 31. mai lokið yrkisútbúgving innan smásølu (konufólkaklæði). Læruplass: Skálabúðin, Tórshavn.**

**Angi Emil Johannesen, Kollafjørður, hevur 16. juni lokið yrkisútbúgving sum timburmaður. Læruplass: Sp/F Bulur, Kollafjørður.**

**Regin G. Guttesen, Tórshavn, hevur 30. juni lokið yrkisprógv sum grafikari (myndgerð/retouche). Læruplass: Repro-Z, Tórshavn.**

**Gert Norðoy Jensen, Klaksvík, hevur 5. juli lokið yrkisprógv sum maskinsmiður. Læruplass: Klaksvíkar Sleipistøð.**

**Heðin Johannesen, Sandur, hevur 14. juli lokið yrkisprógv sum bilmekanikari. Læruplass: Bilfríðkan, Tórshavn.**

## Silvurbrúdleyp

**Onsdagin tann 19. juli hava hjúnini Hildur og Óli Johansen á Tanganum, Tvøroyri, silvurbrúdleyp.**
**Tey verða at hitta heima frá kl. 08.00. Kvøldið verður hildið á Hotel Tvøroyri fyri familjuni.**

**19. juli kunnu hjúnini Jóhanna Maria og Klæmint Ludvig halda silvurbrúdleyp.**
**Tey verða at hitta í Pætursgøtu 29 frá kl. 8.00 til 16.00.**

**19. juli kunnu hjúnini Paulina og Flemming T. Petersen halda silvurbrúdleyp.**
**Adressan er: Industrivænget 1, 4683 Rønnede.**

**Týsdagin 15. august hava hjúnini Sigrun og Eivind av Reyni silvurbrúdleyp.**
**Dagurin verður hildin leygardagin 19. august kl. 18.00 í Bilhøllini á Reyni Service. Tey, ið vilja gleðast við teimum henda stóra dag, verða biðin um at siga frá áðrenn 5. august á telefon 313040.**

**Mikudagin 23. august hava hjúnini Dinna og Eyðun Jacobsen, Glyvrar, silvurbrúdleyp.**
**Dagurin verður hildin fríggjadagin 25. august kl. 19.00 í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum henda stóra dag, verða biðin um at siga frá áðrenn 12. august á tlf. 448355 ella teldupost: eydunj@post.olivant.fo**

## Brúdleyp

**Í dag, 15. juli, kl. 16.00 giftast í Hvalbiar kirkju Jónvør Thomsen, Hvalba, og Ólavur Bjarthamar, Froðba.**
**Brúdleypsadressan er: Ítróttarhøllin í Trongisvági.**

**Í dag, 15. juli, kl. 14.00, giftast í Gunderslev kirkju Margit Martinsdóttir Eliassen, av Skála, og Pauli Baadsager, Næstved.**
**Brúdleypsadressan er: Hjulebæksvej 5, Gelsted, 4160 Herlufmagle.**

**Í dag, 15. juli, kl. 15.00, giftast í Havnar kirkju Julianna Holm Jacobsen, Tórshavn, og Alvi Nielsen, Trongisvágur.**
**Veitslan verður fyri innbodnum í B36-húsinum kl. 19.00.**

**Í dag, 15. juli, kl. 15.30 giftast í Sørvágs kirkju, Sámal J. Samuelsen úr Klaksvík og Torgun Davidsen úr Sørvági, búsitandi í Ballerup.**
**Veitslan verður fyri innbodnum í hølum Sørvágs Húsmøðrafelags kl. 19.00.**

**Í dag, 15. juli, kl. 17.00 giftast í Havnar kirkju Marjun Dahl Klein og Paul Kragesteen, bæði úr Tórshavn.**
**Brúdleypið verður hildið fyri innbodnum í HB-húsinum.**

**Í dag, 15. juli, kl. 16.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Hanne Marie Haahr, Signabøur, og Karl Tore Yri, Noregi.**
**Veitsla er fyri innbodnum í Skálanum.**

**Í dag, 15. juli, giftast í Bratislava Maj Arge Hammer, Tórshavn, og Martin Sirkovsky, Bratislava.**
**Brúdleypsadressen er: Anbroseho 13, 85102 Bratislava.**

**Í dag, 15. juli, kl. 16.00 giftast í Gøtu kirkju Birita Hansen, Norðragøtu, og Janus M. Joensen, Strondum (sonur Solveig og John).**
**Veitsla verður fyri innbodnum í Eydnuni á Oyrabakka kl. 19.**

**Í dag, 15. juli, giftast Ruth Norðgerð, Leirvík, og Jógvan Símun Sevdal. Vígslan verður í Berøa í Saltangará kl. 11.00. Eftir vígsluna verður kalt borð í kjallaranum. Øll eru hjartaliga vælkomin.**

**Leygardagin 22 juli kl. 17.00 giftast í Vesturkirkjuni Heidi Henriksen og Hans Andor Johannesen, Tórshavn**
**Brúdleypsadressan er Berjabrekka 177.**

**Leygardagin 22. juli kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Eydna Udbø Jensen og John Ísheim, bæði úr Tórshavn.**
**Veitsla verður fyri innbodnum í B36-húsinum kl. 19.00.**

**Leygardagin 22. juli kl. 17.00 giftast í Havnar kirkju Beinta Hentze og Christian Didriksen Grahn, bæði úr Tórshavn.**
**Veitsla verður fyri innbodnum í Havnar Klubba kl. 19.**

**Leygardagin 22. juli kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Edith Mýra og Gunnar Bisp, bæði úr Tórshavn.**
**Veitsla verður fyri innbodnum á Føroya Læraraskúla.**

**Leygardagin 22. juli kl. 15.00 giftast í Rønninge kirkju Anly Haldansen, Vestmanna, og Karsten Tjørnfelt, Langeskov.**
**Brúdleypsadressan er: Grønvej 8, 5550 Langeskov.**

**Leygardagin 22. juli giftast í Egedalskirken, Kokkedal, Therese Turiðardóttir, Tvøroyri, og Niels Kreutzmann, Nuuk.**
**Brúdleypsadressan er: Rungstedgård, Rungsted Strandvej 107, 2960 Rungsted Kyst.**

**Leygardagin 5. august giftast í Emmersbæk kirkju í Hirtshals Annika Jacobsen og Kim Durhuus úr Hósvík.**
**Veitslan verður hildin fyri innbodnum á Hotel Tannishus í Tversted.**

**Leygardagin 5. august kl. 16.00 giftast í Hebron á Argjum Joan Agnarsdóttir Petersen, Tórshavn, og Eiler Rasmussen, Skála.**
**Vælkomst verður í Pálsstovu, Mykinesgøtu 7, kl. 19.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarligast biðin um at siga frá á tlf. 318460 ella 441191 í seinasta lagi 22. juli.**

**Leygardagin 5. august kl. 14.00 giftast í Oyndarfjarðar kirkju Elisabeth Gaard, Oyndarfirði, og Dan Petersen, Fuglafirði.**
**Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 20. juli á tlf. 444528 ella 444700.**

**Leygardagin 19. august kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Maria Mohr Edvinsson, Sandi, og Egin Herup Høgnesen, Hoyvík.**
**Vælkomst verður í B36-húsinum kl. 20.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarligast biðin at siga frá innan 5. august á tlf. 313610, 319659, 219512 ella 361026.**

**Fríggjadagin 18. august kl. 15.00 giftast í Siloa í Fuglafirði Maria á Lakjuni, Fuglafirði og Bjørn Simonsen, Klaksvík. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 444404 ella 456252 innan 6. august.**